Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo

www.hafnia.fo

# REINGERÐARFÓLK

**Hotel Hafnia søkir eftir reingerðarfólki, at byrja skjótast tilber.**



**Arbeiðið fevnir um:**
Vanliga reingerð av hotellinum

**Starvstíðin er:**
Sambært vaktarskipan í dagtímum og annaðhvørt vikuskifti.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Hotel Hafnia á telefon 31 32 33

Umsókn skal sendast til:

***Hotel Hafnia***
*Áarvegur 4 - 10*
*FO-100 Tórshavn*
*hafnia@hafnia.fo*

**HOTEL HAFNIA** er eitt altjóða 4-stjørna hotell, við 57 kømurum, 5 fundar- og veitsluhølum, matstovu og lounge.

Hotellið er væl vitjað av handils- og ferðafólki úr øllum heiminum, og hetta er við til at seta dám á livandi umhvørvið.

Vit eru 45 fólk, ið dagliga starvast við at veita Føroya bestu tænastu til gestir okkara.



*Hotel Hafnia* ★★★★

*Hotellið í miðbýnum*



# Tað áhugaverda í tí gerandisliga

**Pedagográðstevna í Norðurlandahúsinum 2. og 3. mars 2007**

## Skrá fyri ráðstevnuna

**Fríggjadagin**

| | |
|---|---|
| **Kl. 10-10.15** | Stuttur inngangur: **Hildur Patursson** |
| **Kl. 10.15-12.15** | **Peter Ø. Andersen, Danmark:** Royndir at stýra pedagogikkini við námsætlanum, menningararbeiði og professionalisering – pedagogikkin millum tað globala og tað lokala |
| **Kl. 12.15-13.15** | Matarsteðgur |
| **Kl. 13.15-15.15** | Marita Lindahl, Finland: Smæstu børnini á stovni |
| **Kl. 15.15-15.45** | Kaffisteðgur |
| **Kl. 15.45-17.45** | **Berit Bae, Noreg:** Børn sum luttakandi einstaklingar/rættur barna at medvirka - í ljósinum av nýggjum námsætlanum |
| **Kl. 17.45-19.00** | Ein góð máltíð |
| **Kl. 19.00-20.00** | Konsert |
| **Kl. 20.00-22.00** | Kafé við góðum práti |

**Leygardagin**

| | |
|---|---|
| **Kl. 10.00-10.15** | Vit byrja aftur: **Hildur Patursson** |
| **Kl. 10.15-12.15** | **Karin Hultman, Svøríki:** Hvussu menna vit tilvitanina um náttúruvísindi, tøkni og støddfrøði hjá bæði gentum og dreingjum í barnagarðinum |
| **Kl. 12.15-13.15** | Matarsteðgur |
| **Kl. 13.15-15.15** | **Daniele Cecchin, Danmark:** Ein leikandi pedagogikk – at skapa søgur saman við børnum |
| **Kl. 15.15-15.45** | Kaffisteðgur |
| **Kl. 15.45-17.00** | Fyrireikað orðaskifti saman við fyrilesarunum um tey 6-ára gomlu og um námsætlanir |

Tilmelding í seinasta lagi 19. februar á www.forleikamenning.fo
Menning tlf. 509164 ella 313506

# Søluráðgevi til Føroya Tele – FT Samskifti

*"Leiðslur kunnu ikki væntast at kenna aftur eitt gott hugskot, um tað ikki er lagt fyri tær av einum góðum sølufólki"*

- David Ogilvy -



**FT Samskifti veitir vegna Føroya Tele samskiftisloysnir til stóran part av vinnulívinum í Føroyum. Stórur dentur verður lagdur á gott kundasamskifti og nøgdsemi millum okkara kundar. Hetta er málsetningurin fyri søluráðgevaralið okkara. Søkt verður eftir einum fólki til liðið.**

Ráðgevin skal taka sær av tørvsgreining, samskifti um og sølu av samskiftis-útgerð og hartil hoyrandi tænastum. Málbólkurin fyri allar ráðgevarnar er vinnukundar í øllum landinum. Tí kann væntast nógv ferðing.

Í samband við ynskið hjá Føroya Tele um at víðka virksemið uttan fyri landoddarnar, kann tað koma uppá tal, at søluráðgevin eisini gerst partur av altjóða toymi fyri at veita vørur og tænastur hjá Føroya Tele aðra staðni enn í Føroyum.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
At arbeiða í einum toymi fyri at veita vinnukundum holla ráðgeving um samskiftisloysnir og útgerð og annars at veita allar tær tænastur, Føroya Tele veitir kundum sínum.
Stórur dentur verður lagdur á at hava eitt gott og støðugt samskifti við kundar okkara og geva teimum eina munagóða tænastu á høgum støði.

**Førleikar og royndir hjá umsøkjarum:**
- royndir við søluarbeiði og kunna vísa á úrslit
- hava persónligan og álitsvekjandi myndugleika
- hava kunnleika og/ella áhuga fyri kunningartøkni og samskiftistøkni
- kunna taka nýggj stig og verða yrkismedvitandi
- vera skapandi og virkisfús/-ur og tora at taka avgerðir
- viðkomandi útbúgving
- koyrikort til vanligan bil
- duga føroyskt og enskt í skrift og talu samskipanar- og/ella leiðsluroyndir eru ein fyrimunur
- arbeiðsroyndir innan sølu í útlandinum er ein fyrimunur

Tann, ið sett/-ur verður, kemur at arbeiða í einum spennandi og virknum um-hvørvi, har sera stórur dentur verður lagdur á at veita góða og viðkomandi ráðgeving til kundarnar, samstundis sum innanhýsis samstarv við upplæring, sínamillum vegleiðing og vitanardeiling er ein partur av uppgávunum.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir førleikum og verður at seta skjótast til ber. Starvsstaður er Klingran í Hoyvík.

Meira fæst at vita um starvið frá Aksel Haraldsen tel 243371.

Umsóknir til starvið skulu vera Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 20. februar 2007 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

**FT Samskifti**
**Ft Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll støðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*